**FÓLKATINGSVALIÐ 2001**

# Í hjørtum okkara býr frælsið

**Heini O. Heinesen,**
*fólkavalevni tjóðveldisflokksins*



Síðani Erlendur Paturrsson sat á fólkatingi hevur ongin tjóðveldisrødd verið at hoyrt á fólkatingi. Um Erlend stóð virðing og danskir politikarar minnast hann enn. Hann talaði tann greiða boðskapin, sum enn í dag brennur sum heitur ylur í okkara hjørtum og sum fekk danir at skilja, hvat stoltleiki og sjálvsvirðing hevur at siga fyri eina tjóð.

Í dag eru vit nærri enn nakrantíð at náa málinum um at stovnseta tjóðveldið Føroyar. Alt er tilreiðar. Tað snýr seg bert um at hava politikarar, ið tora at standa við síni orð og sum tala greitt fyri bæði føroyingum og dønum.

Tí er umráðandi, at fáa eina tjóðveldisrødd á fólkating, sum talar Føroya fólks søk.

Fólkatingsumboðini higartil hava við fáum undantøkum bert verið finnur í einum innanríkispolitiskum donskum talvi og hava harvið forðað fyri føroyska tjóðveldinum. Umboðini frá hinum føroysku flokkunum gerast partar av donskum flokkum – ofta stjórnarflokkum – og afturfyri stuðla danskir flokkar og stjórnir teirra politikki í Føroyum.

Hetta skapar ikki virðing og gevur onga fatan millum danskar politikarar fyri rættindunum hjá føroysku tjóðini. Úrslitið er millum annað, at danska fólkatingið enn ikki hevur viðurkent sjálvsavgerðarrættin hjá føroyingum, og at ongin danskur flokkur tykist hava aðra mynd av føroyingum enn, at vit eru krevjandi ábyrgdarloysingar í einum donskum landsluti. Har er onki broytt síðani 1946, tá fólkaviljin og fólkarætturin vórðu sett til viks.

Tí má sláast fast, at um hinir flokkarnir í Føroyum aftur fáa umboð á danating, so kunnu tey framhaldandi forða fullveldismálinum og kunnu enntá støðga tí við at stuðla donskum flokkum afturfyri at binda Føroyar í danska ríkið. Tey kunnu enntá eftir eini løtu spæla av við sjálvsavgerðarætt føroyinga við at virka fyri eini nýggjari skipan í danska ríkinum. Tá er alt føroyskt tjóðskaparstríð til fánýtis.

Mong dømi er um hetta gjøgnum tíðirnar. Tá ein meiriluti á Løgtingi frá 1923 og frameftir kravdi føroyska málið sum undirvísingarmál í skúlanum — noktaði stjórnin hesum heilt fram til 1938 – og hon varð stuðlað av føroyskum umboðum á danatingi.

At fólkatingsumboð frá øðrum flokkum verða brúkt at seta kílar í millum føroyskar flokkar, hava vit aftur ásannað seinastu 4 árini. Umboðini á fólkatingi hava als onki gjørt til tess at skapa virðing fyri tí sjálvsagda og ediliga máli, at føroyingar taka fulla ábyrgd av egnum landi. Annað umboðið hevur seinastu 4 árini verið avgerandi atkvøðan hjá donsku stjórnini og hevur kortini góðtikið, at danska stjórnin noktar at viðurkenna føroyingar sum tjóð og noktar at viðurkenna okkara tjóðarmál.

Tí heiti eg á øll, sum hava frælsið brennandi í hjartanum, at fara á fólkatingsval og velja Tjóðveldisflokkin.

# Verji rættindi okkara !

**Elisabeth Joensen (Betta),**
*fólkatingsvalevni Sambandsfloksins*



Vit hoyra frá fullveldismonnum, at nú hava vit ein framúr góðan møguleika at koma burtur úr ríkisfelagaskapinum. Nú hava vit tað lagaligu løtuna, at skipa Føroyar sum eitt fullveldisríki. Víst verður á, at landskassin hevur havt umleið 500 mió. kr. í yvirskoti um árið, seinastu árini.

Vit mugu tíverri ásanna, at myndin er ikki so ljósareyð. Tað, sum mangan verður gloymt, tá tosað verður um tað stóra yvirskotið er, at uppi í hesum talinum er 1 milliard. kr. úr danska statskassanum. Taka vit hesa milliardina burturúr, so vísir landskassin ístaðin eitt hall uppá 500 mió. kr. um árið. Hetta sigur ikki so lítið um, hvussu stóran týdning stuðulin úr Danmark hevur.

### Góður byrur

Um vit kanna, hvør orsøkin er til yvirflóðina av peningi í landskassanum júst nú, so síggja vit, at fiskivinnan hevur gjørt tann stóra munin. Fiskiskapurin hevur verið sera góður og fiskaprísirnir óvanliga høgir. Afturat hesum kemur, at alivinnan hevur klára seg sera væl og kasta nógvan pening av sær til samfelagið.

At tað hevur gingist so væl, eiga vit at vera takksom fyri, men hetta eru viðurskifti, sum vit lítla ávirkan hava á. Søgan sigur okkum, at her henda broytingar alla tíðina. Vit hoyra tíðindi um, at prísurin á rækjum og laksi er nógv lækkaður, og støðan hjá hesum vinnum gerst hættislig, um ikki vend kemur í skjótt. Vit mugu ásanna, at okkara búðskapur er viðkvæmur.

### Rættindi og stuðul

Sum kunnugt eru fiskirættindi hjá øðrum tjóðum grundarlagið undir einum parti av okkara fiskivinnu. Okkara politikarar, úr øllum flokkum, hava roynt at gera sítt besta fyri at varðveita hesi rættindi. Hvussu hetta hevur eydnast, eru helst fleiri meiningar um, men nøgdirnar av fiski eru vorðnar smærri, sum árini eru gingin.

Tá tosað verður um rættindi og stuðul, so eiga vit ikki at gloyma, at tey týdningarmiklastu rættindini, eru tey vit eiga í ríkisfelagsskapinum. Tíverri er lítil áhugi fyri at verja hesi, ja sitandi samgonga arbeiðir miðvíst fyri at forkoma hesum rættindum og fáa teir sín vilja, fara teir at siga nei takk til 1/3 av blokkinum í 2002.

Veljarin skal vita, at tá peningur fer at resta í, vegna tann politik sum nú førdur verður, tá verður farið til skattaborgaran.

Mín áheitan til tykkum, sum fara á væl 20. november, er tí: Hjálpi okkum at halda fast við tey rættindi, vit eiga hjá øðrum og ikki minst okkara rættindi í ríkisfelagsskapinum?

Velji Sambandsflokkin !

# Fólkið fyrst !

**Eyðgunn Samuelsen,**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum.*



Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram til hetta fólkatingsvalið undir heitinum samstarv og loysnir og hetta er júst tað, ið vit hava staðið fyri í verki í farna valskeiðið bæði í Føroyum og á fólkatingi.

Samgonguflokkarnir hava verið ósamdir um óteljandi mál heima í Føroyum, tað seinasta nýggja er at teir nú klandrast um hvør skal bera hetta stríð niður á fólkating.

Javnaðarflokkurin vil niður á fólkating fyri at kunna halda áfram við samstarvi og finna loysnir til frama fyri fólkið ið býr í Føroyum.

Men lat okkum gera tað heilt greitt, at tað er á Føroya Løgtingi at føroyskur politikkur skal viðgerðast meðan røðarapallurin á Christiansborg skal nýtast til at viðgera mál ið enn eru felags millum Føroyar og Danmark.

Fyri at koma burturúr naggatødnini og samanbrestunum millum føroyskar og danskar myndugleikar vilja vit virka fyri einari breiðari semju bæði á fólkatingi og løgtingi fyri sjálvstýrislógini. Tað er bráðneyðugt at fáa eina skjóta og góða loysn á ríkisrættarligu støðuni, so vit aftur kunnu fara í holt við tann verðuliga politikkin í Føroyum.

Tey átroðkandi málini ið snúgva seg um fólksins vælferð hava alt ov longi verið sett til viks.

Vit kenna øll trupulleikarnar : tey eldru mangla røktarheimspláss, eftirlønin er alt ov lág, heilsuverkið er niðurslitið, fyri bert at nevna nøkur óloyst mál í hesum valskeiðið.

Lat ongan iva vera, Javnaðarflokkurin vil seta fólkið fyrst ! Lat okkum nýta hetta fólkatingsvalið til at vísa at fólkið skal setast fyrst !! Lat hetta valið vera eina nýggja byrjan við einum virðiligum samstarvi millum Føroyar og Danmark og ein politik í Føroyum har vit fólkið kemur fyrst.

Tí fara vit øll, menn og kvinnur á val og velja Javnaðarflokkin og vit byrja tann 20. november !! Gott val.

**FÓLKATINGSVALIÐ**
**- LESIÐ VALGREINAR ÓKEYPIS Á INTERNET-SOSIALINUM**
Sosialurin
www sosialurin fo



## Maskinførari

Søkt verður eftir maskinførara. Stóra koyrikortið er ein fyrimunur.

**Sp/f í Djúpagili**
tlf. 215921 aftaná kl. 19.00

## Mekanikari

Søkt verður eftir mekanikara til lastvognsverkstaðið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera royndur innan hetta øki.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

## Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki til bókhaldið at byrja beinanvegin.

Viðkomandi má vera væl royndur innan bókhald og má kunna arbeiða sjálvsøtðugt.

Ringið ella skrivið til:

**Berg Motors**
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

## Sjúkrasystrar og sjúkrasystralesandi

**Limafundur verður mánakvøldið 19. november 2001 kl. 19.30 í Tilhaldinum í Tórsgøtu.**

Evni: Arbeiðsumhvørvið við Jan Villemose, sálarfrøðingi.

Tann 5. desember 2001 verður opið hús í hølum okkara í Lucas Debesar gøtu 14 frá kl. 19.00.

**Sjúkrasystrafelag Føroya**

## Kømur ynskjast

Søkt verður eftir tveimum verilsum við atgongd til køk og bað.

J & K
**Tlf. 315060 · Fax 314194**

## Keyp av seyðaskinnum

Seinasta freist at lata seyðaskinn til okkum í ár er **1. desember.**

**Búnaðardepilin**
**FO-410 Kollafjørður**

## FÚTASTOVA



Gávuna til hann/hennara sum eigur alt

Vit hava opið: mánadag-fríggjadag 11-17.00
leygardag 10-14.00

Skeið í Doculive/scanning

27. Novembur

formula.fo

Við Sosialinum
Í BÝIN

Í Býin
- hvønn hósdag



## Eykapolitistur

Eitt starv sum eykapolitistur hjá politinum í Miðvági er leyst at søkja.

Tænastutíðin er 6 tímar um vikuna – vanliga um kvøldið. Samsýningin er í løtuni 2.939,48 kr. um mánaðin.

Umsóknarblað fæst á politistøðini í Miðvági.

Umsókn verður at senda til Føroya Landfúta, postboks 3018, FO-110 Tórshavn innan 23. november 2001.

**Føroya Landfúti**
*Tórshavn hin 8. november 2001*
M. Nepper-Christensen

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo